

# Mær dámar væl at pøsa mínar áhoyrarar



**– Eg gleði meg at vitja tykkara fjarskotnu oyggjar, sum, eg havi hoyrt, eru ógvuliga vakrar, sigur enska superstjørnan Melanie C, sum lovar eina rimmar konsert fríggjakvøldið**

Tá Spice Girls hildu, at nú var nokk, var Melanie C skjótt klár við fyrstu útgávuni í egnum navni, sum ber heitið Northern Star. Ikki kann sigast annað enn, at Melanie C rakti seymin á høvdið við hesi útgávu, og nærum hvørt mansbarn má kennast við sangir sum Never Be The Same Again og I Turn To You.

Hesi løg eru framvegis tann dag í dag javnan at hoyra í føroysku útvarpsrásunum.

Í seinastuni hevur Melanie C millum annað verið á konsertferð í Kanada, har hon ikki hevur vitjað seinastu sjey árini. Eisini hevur hon verið á palli í Týsklandi og í Danmark, har hon vitjaði Samsøfestivalin.

Tað var í samband við hesa vitjanina, at vit hittu fryntligu